# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Fimleikalið í 1928

Mynd frá "Realskúlaframsýningini 1916-66", sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Her er eitt fimleikalið í Realskúlanum í 1928.

**Aftara rað (dreingir) f. v.:** ókendur, ókendur, Samson Højgaard, ókendur, Hendrik Jacobsen (hjá Mikk), ókendur, Børge Poulsen og Svend ella Erling Skarðhamar.

**Miðraðið (dreingir) f.v.:** ókendur, Hans Leon Christiansen, ókendur, Eivind Rubek Nielsen, Jens í Dali, Theodor við Keldu, Sigmund Hoydal og ókendur.

**Fremra rað (genturnar) f.v.:** Ingebeth Højgaard (Rasmussen), Ebba Simonsen (Vang), Jóna Jacobsen (Hansen) (dóttir Jørgin á Áarvegnum), Gunhild Evensen, Karin Maria Vang (Aabak), Esta í Funningsstovu (fyrr Hansen), Olivia Rubeksen (Johansen), Nanna Skála og Tina Jacobsen (Mikk).

Um onkur kennir onkran av teimum ókendu, ella hevur okkurt at viðmerkja til myndina, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024. Eisini um viðkomandi hevur hug at ogna sær myndina (Mynd nr. 255).

*Myndaeigari: Fornminnissavnið*



## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá okkara kæri maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi

**Vagnur Hákunsson Dam**

andaðist og varð jarðaður.

Eina serliga tøkk vilja vit veita tykkum á Lágargarði, ið vóru um hann við hjálpsemi og umsorgan tey seinastu árini.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Lágargarð.
Ein hjartans tøkk til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Sigga**
**Marjun, Sólrun, Hákun og Martin v/ familjum**

## Takk

Takk øll tit, sum komu at heiðra okkum henda stóra dag. Takk fyri gávur, blómur, heilsanir og fjarrit.
Eina hjartans tøkk veita vit okkara børnum við familju, sum gjørdu gullbrúdleypsdagin so góðan fyri okkum.

Øllum verður ynskt eitt Harrans signað nýggjár.

**Hjalma og Andrias**

†

**Elisa Bendtsen**
Norðragøta

andaðist í heiminum leygardagin 3. januar.
Jarðarferðin verður úr Gøtu kirkju mikudagin 7. januar kl. 13.00.

Tey, ið vilja minnast Lisu, kunnu lata eina peningagávu til Heilafelagið, konta í peningastovnunum

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Elisu Bendtsen** fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum týsdagin 6. jan kl. 16. Jarðarferðin verður úr Gøtu kirkju mikudagin kl. 13. Tey í vilja minnast Lisu kunnu lata Heilafelagnum eina peningagávu konta i Eik

**Dagurin**
**6. januar. Trettandi dagur jóla.** Trettandi verður hildin til minnis um vísmenninar úr Eysturlondum, sum komu at tilbiðja nýfødda jødakongin. 6. januar var í fornkirkjuni hildin sum føðingardagur Krists og var róptur Epifania Domino (opinbering Harrans). Tá teir í 4. øld semjast um 25. desember sum føðingardagin, verður 6. januar trettandi dagur jóla.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

Sosialurin -har tað hendir